**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Yvirlitstrolingar. Túrur nr. 1506**
**Tíðarskeið 04-18/03 2015**

**Fólk frá HAV.:** Jens Arni Thomassen, Mourits Mohr Joensen, Poul Vestergaard og Jákup Reinert.

**Ábyrgd:** Jákup Reinert, ið eisini var toktleiðari.

**Endamál:** Hetta var annar túrurin av vár-yvirlitstrolingunum í ár. Høvuðsendamálið við hesum túrum er at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Umframt skal vekt, tal og longdarbýti skrásetast fyri øll fiskasløg, ið verða veidd, og nytruprøvar skulu eisini takast av øðrum sløgum, sí niðanfyri. Eisini skulu magakanningar gerast av toski, hýsu og upsa.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinshamn lemmar. Breitlar 60 og 120 m.

**Kanningarøki:** Trolstøðirnar eru lagdar kring allan Landgrunnin grynri enn 500 m, sí mynd 1. Hetta eru støðir, ið eru tiknar á hesum báðum túrunum í vár, t.e. bæði á seinasta túri (1504) og á hesum túrinum (1506).






**Mynd 1**. Yvirlitstrolingar á vári við Magnusi Heinasyni. Landgrunnurin er býttur upp í 15 øki (myndin til vinstru). Ávíst tal á støðum verður tikið í hvørjum øki, tilsamans 100 støðir fyri allan Landgrunnin. Somu støðir verða tiknar á hvørjum ári.

**Um túrin:** Farið varð av Havnini hóskvøldið 5. mars kl. 23$^{00}$. Av teimum íalt 100 trolstøðunum, ið verða tiknar á yvirlitstrolingunum á vári, vórðu 59 støðir tiknar fyrra túrin; sostatt vóru 41 støðir eftir at taka á hesum túrinum. Byrjað varð at fiska

fríggjamorgunin 6. mars kl. $06^{40}$ á eini støð eystarlaga á Munkagrunninum. Veðrið var einki serligt, og tá vit aftan á 45 minuttir blivu fastir, vórðu líkindini vorðin so ring, at avgjørt varð at steðga á fyribils, og siglt varð tí norðureftir út fyri Hvannhaga at kroka. Yvirhøvur viðraði sera illa á túrinum, og fleiri “bakkdagar” vóru. Tískil lógu 7 støðir eftir, tá Magnus Heinason kom á Havnina aftur týskvøldið 18/3 kl. $23^{50}$. Avrátt varð tí at royna at taka hesar 7 støðirnar á næsta túri, áðrenn farið varð út á Føroyabanka at gera yvirlitstrolingar har. Vegna tekniskt brek var fráferðin seinkað, og tað eydnaðist bert at taka 3 støðir, áðrenn farast mátti á Føroyabanka; sostatt vórðu bert 96 støðir tiknar á vári í ár.

**Prøvataking:** Veiðan varð viðgjørd sambært sýnishandbókini og kanningarætlanini, og eitt yvirlit yvir tal á nytru- og magaprøvum av ávikavist toski, hýsu, upsa, svartkjafti, longu, brosmu og blálongu sæst í talvu 1 niðanfyri. Samstundis sum nytrur vórðu tiknar, varð eisini skrásett longd, vekt, kyn og búningarstig, og regluliga vórðu magar av toski, hýsu og upsa tiknir og kannaðir umborð.

**Talva 1.** Yvirlit yvir nytru- og magaprøvar á Magnus Heinason túri nr. 1506.

| Toskur | Toskur | Hýsa | Hýsa | Upsi | Upsi | Svartkjaftur | Longa | Brosma | Blálonga |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal á nytraðum fiski | Tal á magum | Tal á nytraðum fiski | Tal á magum | Tal á nytraðum fiski | Tal á magum | Tal á nytraðum fiski | Tal á nytraðum fiski | Tal á nytraðum fiski | Tal á nytraðum fiski |
| 367 | 82 | 389 | 69 | 407 | 66 | 55 | 15 (magar=2) | 7 (magar=1) | 2 |

| | |
|---|---|
| Tal á nytraðum fiski tilsamans: | 1242 |
| Tal á magum tilsamans: | 220 |

**Nær verða prøvarnir upparbeiddir:** Ynskiligt er, at nytrurnar skulu vera lisnar, og øll data løgd inn í databasu sum skjótast, helst áðrenn 12. apríl.

**Fyribils úrslit:** Ikki fyrr enn nytrurnar eru lisnar, og øll data frá túrunum eru løgd í basu, ber til at siga nakað nágreiniligt um úrslitini av yvirlitstrolingunum á vári í ár, men nøkur ávegis úrslit skulu takast fram. Talva 2 vísir yvirlit yvir veiðuna av teimum ymsu sløgunum á hesum túrinum; 32 fiskasløg vórðu veidd tilsamans (í mun til 36 í fjør) umframt mathøgguslokk og eitt annað slag av høgguslokki (*Alloteuthis*), hummara, rækju, heksakrabba, trøllakrabba og ymiskt annað, ið er bólkað sum skrambul, t.d. grót, krossfiskar og igulker. Í somu talvu sæst eisini, á hvussu nógvum støðum tey einstøku fiskasløgini eru fingin, t.e. hvussu vanlig tey eru. Mest varð fingið av hýsu, og síðani komu ávikavist toskur, upsi, lítli kongafiskur og longa. Hýsa varð fingin á 86% av støðunum, toskur á 84%, upsi á 81% og lítli kongafiskur á 73%.

Um allar støðirnar í vár verða lagdar saman (báðir túrar), fæst ein heldur øðrvísi mynd (Talva 3). Á teimum 96 støðunum vórðu veidd 37 ymisk fiskasløg í mun til 42 sløg í fjør; umframt vórðu hummari, rækja, heksakrabbi, trøllakrabbi, 3 sløg av høgguslokki og skrambul (sí omanfyri) fingin. Mest var av hýsu, og síðan komu ávikavist toskur, upsi, lítli kongafiskur, hvítingsbróðir, longa, svartkjaftur og lýrur. Um títtleikan er at siga, at hýsa varð fingin á 85% av støðunum, upsi á 83%, toskur á 81%, lítli kongafiskur á 75% og hvítingsbróðir á 71%.

Størsti denturin á hesum túrum verður lagdur á tosk, hýsu og upsa; men eisini fyri onnur sløg fast ein ábending um, hvussu nógv er til. Á myndunum 2-7 sæst veiða upp á roynd

frá báðum yvirlitstrolingunum á vári (kg/tíma) fyri nøkur úrvald fiskasløg. Veiða upp á roynd verður vanliga nýtt sum eitt mát fyri, hvussu stórir stovnarnir eru í vekt. Tølini fyri t.d. upsa skulu tó takast við stórum fyrivarni, tí slíkar yvirlitstrolingar vísa seg at vera rættuliga óneyvar fyri upsa; hetta skyldast m.a., at upsi ofta gongur í torvum. Verður rakt í eina torvu, so fæst nógv, annars fæst lítið, og úrslitið sigur tí ikki so nógv um, hvussu nógv er til í øllum økinum. Nakað tað sama ger seg galdandi fyri tosk í gýtingartíðini, sum er í mars. Tá savnast hann ofta og stendur tættur í smáum økjum. Verður tóvað á tílíkum økjum, fæst nógv, uttan at tað neyðturviliga merkir, at stovnurin er stórur.
Eftir hesum úrslitum vaks hvítingsbróðir nógv í 4 ár herfyri, minkaði munandi aftur næstu 2 árini, vaks so í 2 ár, men veiðan í ár var væl minni enn tað; hóast tað tykist stovnurin at vera hampuliga væl fyri. Lítið hevur verið at fingið av svartkjafti í fleiri ár, men nú sær betri út, serliga tí at væl meira hevur verið at fingið av smáttfallandi fiski, sum merkir, at tilgongdin er batnað. Lítli kongafiskur og gulllaksur tykjast at vera støðugir (Mynd 2).




**Mynd 2.**

Longa tykist væl fyri, meðan brosma er í minking; stóri kongafiskur hevur verið støðugur á einum lágum støði í fleiri ár (Mynd 3). Av flatfiski tykist reyðsprøka at vera væl fyri, tunga hevur verið støðug seinastu mongu árini, meðan sera lítið hevur verið at fingið av kalva seinastu fimm árini (Mynd 4); havtaska hevur verið sera støðug í fleiri ár.




**Mynd 3.**




**Mynd 4.**

Við tí stóru roynd, ið er undir Føroyum, vil tilgongdin av ungfiski tey einstøku árini í stóran mun gera av, hvussu stórir stovnarnir eru. Av tí sama er stórur partur av stovnunum ungur fiskur. Og bæði stovnur og veiða vilja vera skiftandi ár undan ári, tí tilgongdin er skiftandi. Seinastu nógvu árini hevur náttúran verið kørg, og hevur hetta ávirkað tilgongdina av toski og hýsu serliga nógv. Vektin á einstøku fiskunum hevur sjálvandi eisini týdning fyri, hvussu stór stovnsvektin er. Í ár vóru bæði toskur, hýsa og upsi um miðal í holdum.




**Mynd 5**. Veiða upp á roynd fyri tosk frá yvirlitstrolingunum á vári.

Á mynd 5 sæst, hvussu skjótt toskastovnurin kom fyri seg aftur eftir tey sera vánaligu kreppuárini, og var orsøkin teir sera góðu árgangirnir frá 1992 og 1993. Eisini hýsa vaks skjótt (Mynd 3), og var tað her 1993- og 1994-árgangirnir, ið skaraðu framúr. Góð tilgongd fekk síðan toska-, hýsu- og upsastovnarnar at vaksa, men frá 2002 minkaði toskastovnurin nógv til søguliga lág virði. Síðan 2007 vaks stovnurin aftur vegna hampuliga góða tilgongd, men seinastu fýra árini er lítið fingið. Ikki fyrr enn nytrurnar eru lisnar um einar tvær vikur, kann aldursbýtið í stovninum verða roknað, so at m.a. støddin á nýggjum árgangum kann verða mett. Fyribils tykist tilgongdin at vera lítil seinastu árini.




**Mynd 6**. Veiða upp á roynd fyri hýsu frá yvirlitstrolingunum á vári.

Fyri hýsu er veiðan upp á roynd støðugt minkað síðan 2002, og var úrslitið í 2010 á leið tað í 1994 (Mynd 6); størsta orsøkin til hesa minking stavar helst frá vánaligari tilgongd

í nógv ár. Síðan 2011 hómast ein lítil bati, ið serliga stavar frá batnandi tilgongd. Úrslitið í ár vísir, at vøksturin stendur við, men enn er langt eftir á mál.

Havandi í huga ta stóru óvissu við slíkum kanningum av upsa, so er ein varislig niðurstøða helst, at upsastovnurin er nakað minni enn miðal fyri tíðarskeiðið 2002-2009, men hann er ikki illa fyri (Mynd 7).




**Mynd 7**. Veiða upp á roynd fyri upsa frá yvirlitstrolingunum á vári.

.

*2. apríl 2015* *Jákup Reinert*

**Talva 2.** **Yvirlit yvir veiðu pr. fiskaslag á túri 1506**
**37 støðir íalt**

| Fiskaslag | Veiða, kg | Støðir við fiski, % |
|---|---|---|
| Hýsa | 4917.249 | 86 |
| Toskur | 4559.935 | 84 |
| Upsi | 3176.821 | 81 |
| Lítli kongafiskur | 924.708 | 73 |
| Longa | 704.088 | 54 |
| Gulllaksur | 469.250 | 32 |
| Svartkjaftur | 382.587 | 24 |
| Hvítingur | 292.841 | 32 |
| Hvítingsbróðir | 247.444 | 78 |
| Stóri kongafiskur | 206.038 | 32 |
| Reyðsprøka | 140.460 | 57 |
| Knurrhani | 89.168 | 54 |
| Havmús | 82.342 | 11 |
| Tunga | 81.555 | 59 |
| Trantkongafiskur | 75.991 | 11 |
| Brosma | 60.550 | 32 |
| Skrambul | 56.752 | 86 |
| Búksvarti kongafiskur | 44.311 | 5 |
| Lálla | 42.088 | 14 |
| Sandsprøka | 39.390 | 49 |
| Lítlabrosma | 35.678 | 11 |
| Kjaftsvarti kongafiskur | 30.392 | 14 |
| Havtaska | 27.705 | 19 |
| Mathøgguslokkur | 25.042 | 41 |
| Rognkelsi | 24.905 | 8 |
| Glaskvoysa | 22.790 | 14 |
| Hvassasprek | 20.573 | 22 |
| Lýrur | 14.785 | 5 |
| Streymsild | 12.089 | 3 |
| Blálonga | 11.150 | 5 |
| Hummari | 3.690 | 3 |
| Sild | 1.684 | 11 |
| Glýsufiskur | 0.801 | 5 |
| Heksakrabbi | 0.565 | 3 |
| Silvurmurtur | 0.375 | 8 |
| Nebbasild | 0.165 | 16 |
| Alloteuthis | 0.131 | 3 |
| Rækja | 0.043 | 3 |
| Trøllakrabbi | 0.042 | 3 |

Talva 3. Yvirlit yvir veiðu pr. fiskaslag á vári 2015
Báðir túrar tilsamans - 96 støðir íalt

| Fiskaslag | Veiða, kg | Veiða pr. støð, kg | Støðir við fiski, % |
|---|---|---|---|
| Hýsa | 12601.665 | 131.267 | 85 |
| Toskur | 11239.898 | 117.082 | 81 |
| Upsi | 8378.330 | 87.274 | 83 |
| Lítli kongafiskur | 3673.318 | 38.264 | 75 |
| Hvítingsbróðir | 2702.452 | 28.151 | 71 |
| Longa | 2482.537 | 25.860 | 64 |
| Svartkjaftur | 2385.108 | 24.845 | 29 |
| Gulllaksur | 1612.144 | 16.793 | 28 |
| Silvurmurtur | 1066.619 | 11.111 | 7 |
| Stóri kongafiskur | 876.110 | 9.126 | 27 |
| Hvítingur | 749.953 | 7.812 | 48 |
| Reyðsprøka | 673.743 | 7.018 | 36 |
| Brosma | 285.164 | 2.970 | 41 |
| Tunga | 280.822 | 2.925 | 55 |
| Knurrhani | 221.496 | 2.307 | 41 |
| Skrambul | 216.420 | 2.254 | 70 |
| Havmús | 174.011 | 1.813 | 8 |
| Trantkongafiskur | 131.625 | 1.371 | 7 |
| Kjaftsvarti hávur | 125.271 | 1.305 | 3 |
| Lýrur | 101.200 | 1.054 | 6 |
| Lítlabrosma | 97.261 | 1.013 | 6 |
| Blálonga | 91.019 | 0.948 | 7 |
| Sandsprøka | 89.672 | 0.934 | 39 |
| Havtaska | 75.491 | 0.786 | 20 |
| Mathøgguslokkur | 67.157 | 0.700 | 44 |
| Lálla | 50.049 | 0.521 | 7 |
| Búksvarti hávur | 44.311 | 0.462 | 2 |
| Hvassasprek | 43.589 | 0.454 | 21 |
| Rognkelsi | 39.070 | 0.407 | 7 |
| Kjaftsvarti kongafiskur | 32.596 | 0.340 | 7 |
| Sild | 25.468 | 0.265 | 8 |
| Glaskvoysa | 22.790 | 0.237 | 5 |
| Tindaskøta | 21.493 | 0.224 | 2 |
| Kalvi | 8.013 | 0.136 | 7 |
| Streymsild | 12.089 | 0.126 | 1 |
| Skøta | 11.850 | 0.123 | 1 |
| Steinbítur | 4.465 | 0.047 | 2 |
| Makrelur | 4.432 | 0.046 | 7 |
| Hummari | 3.690 | 0.038 | 1 |
| Glýsufiskur | 3.418 | 0.036 | 6 |
| Agnhøgguslokkur | 0.909 | 0.009 | 6 |
| Heksakrabbi | 0.565 | 0.006 | 1 |
| Nebbasild | 0.352 | 0.004 | 14 |
| Alloteuthis | 0.131 | 0.001 | 1 |
| Rækja | 0.043 | 0.0004 | 1 |
| Trøllakrabbi | 0.042 | 0.0004 | 1 |